FÍGGJARMÁLARÁÐIÐ

| Rundskriv | Dato<br>21. februar 2011 |
|---|---|
| Til<br>**Aðalráðini** | J. nr.<br>**2100-0132/2011\1** |
| Heiti<br>**Rundskriv um merking av akførum hjá landinum** | |

**§ 1.** Øll akfør hjá landinum skulu verða týðuliga merkt við navninum á tí stovni, sum akfarið hoyrir undir og/ella búmerki stovnsins.

**§ 2.** Um so er, at stovnsnavnið ikki er partur av einum búmerki, skulu bókstavirnir í minsta lagi verða 7 cm. høgir og 1,3 cm. tjúkkir.

**§ 3.** Búmerkir skulu í minsta lagi verða 450 $cm^2$ í vídd, uttan mun til formin á tí einstaka búmerkinum.

**§ 4.** Liturin á bókstavunum og/ella búmerkinum skal veljast alt eftir hvønn lit akfarið annars hevur, soleiðis at týðuligur mótsetningur er millum litin á akfarinum og litin á bókstavunum og/ella búmerkinum.

**§ 5.** Akfarið skal merkjast á báðum síðum.

**§ 6.** Akstovan hevur eftirlit við, at reglurnar í §§ 1-5 verða hildnar.

**§ 7.** Akstovan kann í heilt serligum førum loyva undantøkum frá merking av akførum hjá landinum í §§ 1-5. Talan kann t.d. verða um eftirlits- og innheintingaruppgávur hjá almennum stovnum.

**§ 8.** Tað er ikki loyvt at nýta akfør hjá landinum til privata nýtslu.

**§ 9.** Hesar reglur koma í gildi 1. mars 2011. Samstundis fer úr gildi umfarsskriv um merking av akførum hjá landinum frá 2. juli 1993.

**Fíggjarmálaráðið, 21. februar 2011**

**Jóannes Eidesgaard**
landsstýrismaður

**/Petur Alberg Lamhauge**
fíggjarmálastjóri

Kvíggjartún 1 • Postsmoga 2039 • 165 Argir
(+298) 35 20 20 • (+298) 35 20 25 • fmr@fmr.fo • www.fmr.fo

## UMFARSKRIV
## UM
## MERKING AV AKFØRUM HJÁ LANDINUM

§ 1. Øll akfør hjá landinum skulu verða týðuliga merkt við navninum á tí stovni, sum eitt akfar hoyrir undir og/ella búmerki stovnsins.

§ 2. Bókstavir skula í minsta lagi verða 7 cm. høgir og 1,3 cm. tjúkkir.

§ 3. Búmerkir skula í minsta lagi verða 450 cm2 í vídd, uttan mun til formin á tí einstaka búmerkinum.

§ 4. Liturin á bókstavunum og/ella búmerkinum skal veljast alt eftir hvønn lit akfarið annars hevur, t.v.s. soleiðis at týðuligur mótsetningur er millum litin á akfarinum og litin á bókstavunum og/ella búmerkinum.

§ 5. Akfarið skal merkjast á báðum síðum.

§ 6. Bileftirlit Føroya hevur eftirlit við, at reglurnar í §§ 1-5 verða hildnar.

§ 7. Tað er ikki loyvt at nýta akfør hjá landinum til privata nýtslu.

§ 8. Hesar reglur koma í gildi 1. september 1993. Samstundis fara úr gildi tær reglur, sum landsstýrið áður hevur ásett um merking av akførum hjá landinum.

Føroya Landsstýri, tann 2. juli 1993.

landsstýrismaður

Jóannes Eidesgaard / Kári Petersen

Uppskot til merkingar av tænastuakførum.




